# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Til minnis um flokslærara okkara
# Óla Berg

Tá ið vit fóru í skúla fyri seks árum síðani, gjørdist Óli Berg flokslærari hjá okkum, og síðan hava vit havt hann í fleiri lærugreinum hvørt ár. Hetta skúlaárið høvdu vit hann í rokning, søgu og náttúru -og tøkni. Óli var næstan ongantíð sjúkur, hann var næstan altíð í skúla, so vit vóru sera skelkað og kedd, tá ið hann gjørdist so sjúkur, at hann doyði. Hann var í skúla hjá okkum mánadag, og longu leygardag var hann deyður.

Óli var ógvuliga góður við okkum. Hann forsvaraði okkum altíð, og hann segði, at vit vóru hansara næmingar.

Vit hava sera nógv góð minnir um Óla. Hvørt ár hava vit verið útferðir við honum runt í landinum. Vit hava verið í Kirkjubø, á Sandi, vitjað nógv støð í Havn millum annað forn-minnissavnið, men eisini her suðuri hava vit verið nógvastaðni. Vit hava verið í kolanámunum her í Hvalba, niðri í gamla skúla, gingið upp í gjøgnum Káragjógv og so hava vit eisini verið í Vági og bovlað.

Óli kundi vera ógvuliga stuttligur, og hann dugdi sera væl at siga frá søgum, hetta kom serliga fram til hugnaløtuna saman við foreldrunum seinastu jól, tá ið vit øll sótu í skellilátri og lurtaðu, tí Óli dugdi so væl at gera alt so livandi fyri okkum.

Vit halda, at tað er so løgið at koma í skúlan, tá ið vit ikki hoyra málið í Óla, og vit ikki síggja hann.

Viðhvørt droyma vit um hann um náttina, og hann fer altíð at vera ein partur av okkum, tí vit minnast alt tað, hann hevur lært okkum.

Vit lýsa frið yvir minnið um Óla Berg, flokslærara okkara.

**6. flokkur í Hvalba**



*Her eru vit á útferð í Kirkjubø saman við Óla*

# Sigrun Mortensen 60 ár

Hósdagin 28. mai rundar Sigrun Mortensen tey seksti.

Sigrun er fødd hin 28. mai 1949 í Tórshavn. Hon er dóttur Juliu Jacobsen, f. Hansen úr Nólsoy og Jákup Ki Jacobsen úr Tórshavn.

Sigrun gekk í skúla í Kommunuskúlanum. Eftir lokna skúlagongd fór hon at arbeiða m.a. hjá Hans Hendrik Jacobsen í nøkur ár, og so eftir hetta hjá Thomas Dam Búnýti í umleið 25 ár. Harumframt hevur hon serverað til ymisk tiltøk gjøgnum nógv ár. Nú arbeiðir hon á Lág-argarði og hevur gjørt tað í 10 ár.

Sigrun er gift við Kaj P. Mortensen, av Trongisvági á 35. ári og saman eiga tey 4 børn og eitt ommubarn.

Sigrun verður burturstødd á 60 ára degnum.

*red*



†

## Andlát og jarðarferðir

**Hildigerð Hansen í Garðinum í Klaksvík** andaðist í heiminum mánadagin, 74 ára gomul.

Jarðarferðin hjá **Erlandi Stenberg** verður úr Sumbiar kirkju mikudagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Erland kunnu lata Missiónshúsinum í Sumba eina peningagávu, konta í peningastovnunum.

## Rætting

Í tíðindaskrivinum hjá Postverkinun í sambandi við nýggju frímerkini, stóð m.a. at annað av frímerkjunum hjá Edwardi Fuglø avmyndaði Heygadrang og Mars. Tað er ikki rætt. Frímerkið avmyndar Heygadrang og Jupiter.




*Heygadrangur og Jupiter*

**Dagurin**
**27. mai. Lucianus**, deyður umleið ár 200. Saman við fleiri øðrum tikin av døgum um Svartahavsleiðina. Kristian Osvald Viderø varð føddur hendan dagin í 1906.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

